SJÚKRAHÚS VERKIÐ

# Landssjúkrahúsið - Oyrna-Nasa-Hálsdeildin - B4

# Vegleiðing fyri vaksin og børn, tá mandlurnar verða tiknar

**Fyrireiking:**
Vanligt er at møta sama dag, sum skurðviðgerðin verður gjørd. Snýr tað seg um eitt barn, verður annað av foreldrunum innlagt saman við barninum og fylgir barninum allan vegin, til ta er sovnað inni á skurðviðgerðarstovuni. Gongst eftir ætlan, verður tú útskrivaður dagin eftir skurðviðgerðina.

**Kvøldið fyri skurðviðgerðina skal tú FASTA frá kl. 24:00**

**Fyrireikingar á deildini:**
Tablettir, tilráddar av narkosulækna, verður givið. Børn fáa EMLA-plástur (Lokaldoyvandi) á handabakið. Undir skurðviðgerðini skalt tú ikki hava neglalakk; ringar, hálsprýði ella tílíkt á. Langt hár skal vera bundið upp.

Viðgerðin fer fram í fullari doyving, og varir í uml. ein ½ tíma. Av skurðstovuni verður tú koyrdur beinleiðis inn í viðraking, har fólk eru um teg, til tú ert heilt vakin, og verður koyrdur á deildina. Annað av foreldrunum kunnu vera við barninum inni í viðraking.

**Aftaná skurðviðgerðina:**
Vanliga verður tú útskrivaður dagin eftir skurðviðgerðina, tá oyrna-nasa-hálslæknin hevur hugt í hálsin.

**Kostur:**
Sama dag fært tú bert kalt flótandi. Dagin eftir kanst tú eta vanligan kost, tó ikki skorpur, súrepli ella annað ið kann ríva í hálsin. Tú skalt heldur ikki eta ov heitan, kryddaðan mat.

**Pína:**
Vanligt er at verða eymur og hava pínu í hálsinum, møguliga strálandi upp móti oyrunum fyrstu dagarnar aftaná skurðviðgerðina, - verður ofta samanborið við pínu sum við ringan hálsbruna. Mælt verður tá til at taka t.d. Panodil, sum fæst í hondkeypi á apotekinum. Ísur kann eisini linna væl um pínuna og eymleikan. Aftaná skurðviðgerðina er hálsurin eitt sindur hovin, tí kann tað lætta um at hava høgt undir høvdinum fyrstu næturnar.

**Fepur:**
Fært tú fepur, set teg tá í samband við kommunulæknan.

**Bløðing:**
Umleið 1 viku aftaná skurðviðgerðina detta skón (belegningar) av, sum sita á sárinum í hálsinum. Blóðrípur kunnu tá síggjast í spýttinum. Um rættulig bløðing kemur frá hálsinum, far tá beinanvegin á skaðastovu ella set teg í samband við lækna.

**Áheitan:**
Einans brúsubað fyrstu vikuna – Ikki ov heitt. Best er at binda frið fyrstu 7-10 dagarnar, tvs. ikki íðka ítrótt, lyfta ella gera annað tungt kropsligt arbeiði, tí hetta økir um vandan fyri bløðing í hálsinum. Mælt verður av somu orsøk til, at børn ikki eru einsamøll heima fyrstu dagarnar aftaná skurðviðgerðina.

**Sjúkramelding:**
Verður vanliga skrivað fyri 7-10 dagar.

**Skúli/Barnagarður:**
Kennir barnið seg væl, er eingin forðing fyri, at tað fer aftur í skúla/barnagarð, eftir 10 dagar.

Okt. 2025

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo